# Frystigoymsla byggjast í Vestmanna

**- Økið, sum Tummas Christophersen og aðrir hava søkt um, er nú byggibúgvið, og klárt er hjá teimum at fara í gongd, sigur Karl Olsen, borgarstjóri í Vestmanna**

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Vestmanna kommuna hevur nú byggibúgvið eitt økið niðanfyri Holmsbakka, sum er beint innanfyri Brandstøðina.

Tað eru J&K Petersen, sum hava gjørt hetta arbeiði fyri kommununa.

Felagið hevur gjørt Fjalsveg fyri kommununa, og tí var nærliggjandi, at J&K Petersen eisini tóku sær av at planera økið undir Holmsbakka.

### Frystigoymsla

Karl Olsen, borgarstjóri í Vestmanna, sigur, at vinnulívsmenn í bygdini við Tummasi Christopersen á odda hava søkt kommununa um byggibúgvið lendið til eina frystigoymslu, sum eitt felag, ið teir fara at stovna, ætlar at byggja á havnalagnum.

- Ein partur av hesum lendi var jú havnalag, og tí hevur arbeiðið at gera lendið byggibúgvið tikið lutfalsliga stutta tíð. Hinvegin hava vit planerað eitt størri øki enn tað, sum í fyrsta lagi skal brúkast til frystigoymsluna.

Borgarstjórin sigur, at soleiðis, sum hann hevur skilt vinnulívsmenninar, er ætlanin ikki at byggja eina ovurhonds stóra goymslu beinanvegin, men heldur eina minni goymslu, sum kann útbyggjast eftir tørvi.

- Økið, sum Tummas Christophersen og aðrir hava søkt um, er nú byggibúgvið, og klárt er hjá teimum at fara í gongd. Onkur formell viðurskifti eru eftir at avgreiða, men hesi merkja ikki, at bygg-ingin av goymsluni ikki kann fara í gongd, sigur hann.

Frystigoymslan, sum ætlanin er at byggja á havnalagnum í Vestmanna, verður í fyrstu syfti 20x30 metrar stór.

Lendið undir goymsluni verður leigað frá kommununi, sum vanligt er í slíkum føri.

### Avmarkað íløga

Karl Olsen sigur, at sjálv byggibúningin av lendinum undir Holmsbakka hevur kostað umleið eina hálva miljón krónur, og síðan hevur kommunan keypt eini hús, sum eru tikin niður. Samlaði kostnaðurin av hesi verkætlan hjá kommununi liggur soleiðis um 1,3 miljónir krónur.

Onnur úthús hava staðið á tí lendi, sum nú er ruddað og planerað, men hesi hús hevur kommunan keypt fyri fleiri árum síðan.

- Arbeiðið, sum nú er gjørt við byggibúning við meira, slóðar eisini fyri møguleikanum einaferð í tíðini at breiðka vegin, sum gongur omanfyri havnalagið, sigur borgarstjórin, Karl Olsen.



*Frystigoymslan, sum ætlanin er at byggja á havnalagnum í Vestmanna, verður í fyrstu syfti 20x30 metrar stór – við møguleika fyri seinni útbygging*

*Mynd: Birgir W. Høgnesen*

Vestmanna kommuna:

# Skattainntøkurnar settu met í juli

**Borgarstjórin í Vestmanna fegnast um, at vinnulívsfólk í kommununi hava dirvi til at gera íløgur og síggja møguleikar í nýggjum vinnuligum verkætlanum**

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Inntøkurnar av kommunuskatti hjá Vestmanna kommunu hava ongantíð áður verið so høgar sum í juli, tá tær vóru omanfyri 3 miljónir krónur.

- Hetta er tað mesta nakrantíð, sigur ein fegin borgarstjóri, Karl Olsen.

Tá skattainntøkurnar annars hava verið mestar í einum mánaða, hava tær ligið um 2,6-2,8 miljónir krónur.

Borgarstjórin sigur, at kommunan fær nógvan pening inn í skatti, men at inntøkurnar vóru serliga høgar í juli, stendst helst av, at rættiliga nógv gulllaksaarbeiði hevur verið á virkinum hjá Faroe Seafood í Vestmanna í hesi vertíðini.

- Nú virkið arbeiðir gulllaks, hava tey ikki verið í summarfrí, og sum eg havi skilt, hava tey eisini arbeitt í vaktum, soleiðis at rættiliga nógv fólk hava arbeitt nógvar tímar á virkinum um vikuna, sigur hann.

Borgarstjórin fegnast annars um, at vinnulívsfólk í kommununi hava dirvi til at gera íløgur og síggja møguleikar í nýggjum verkætlanum.

- Vit fegnast eisini um, at vinnulívsfólk við Tummasi Christophersen á odda nú fara at byggja eina frystigoymslu á havnalagnum. Hetta fer at skapa betri møguleikar í kommununi at goyma fiskavørur, eins og hetta hugsandi eisini fer at geva Vestmanna havn nakrar eykainntøkur. Haraftrat er væntandi, at nakað av virksemi verður skapt við móttøku og avskiping av frystu vørunum.

Umframt at vera reiðari og skipaeigari, er Tummas Christophersen eisini nevndarformaður í Faroe Seafood, og óhugsandi er tí ikki, at teir, sum standa aftanfyri byggingina av frystigoymsluni, fáa í lag samstarv við virkið hjá Faroe Seafood.

Um fíggjarligu gongdina í Vestmanna kommunu annars, sigur borgarstjórin, at nú er skuldin hjá kommununi komin niður á eina álíkning.

- Jú, vit kunnu ikki annað enn vera væl nøgd við gongdina, sum hon er í løtuni, sigur Karl Olsen.

